

Johann Sverdrup - stóra norska oljuætlanin. Mynd: Øyvind Hagen/Statoil

# Stór minking í talinum á leysum oljustørvum

**Jógvan Hugo Gardar**

15.11.2015 - 21:58

Oljan.fo

Talið á leysum størvum í norsku oljuvinnuni eru minkaði við einari helvt hetta farna árið. Í norsu vinnuni yvirhøvur eru 39 prosent færri leys størv í dag samanboriði við fyri einum áro síðani.

Í triðja ársfjórðingi vóru 51.800 leys størv í norsku vinnuni. Hetta eru 2900 færri størv enn fyri árið síðani, vísa tøl frá norsku hagstovuni, Statistisk Sentralbyrå.

Talið á leysum størvum í norsku oljuvinnuni er minkað javnt síðani áðrenn jól í 2012. Í oljuvinnuni vóru 600 størv leys í triðja ársfjórðingi í ár, ella neyvt helmingurin av tí sum var tókt fyri einum ári síðani.

Hinvegin er talið á leysum størvum í vøru- og tænastuvinnuni økt.